# Bergfrost undir stóra bygging í Fuglafirði

**Ætlandi stendur høllin, sum felagið fer at brúka til pakking, skiljing og goymslu av plattum, liðug til várs**

BYGGING
*Vilmund Jacobsen*

**Fuglafjørður:** Bergfrost í Fuglafirði fer í næstum at byggja eina umleið 650 fermetra stóra høll á havnalagnum niðanfyri frystitunnilin.

Sambært ætlanini, stendur høllin klár at taka í nýtslu einaferð komandi vár.

Hetta verður í fyrsta lagi ein pakkihøll, har felagið eitt nú fer at pakka fisk, skilja og goyma plattarnar undir taki.



*Fuglafjarða kommuna er ein kommuna í stórari menning. Hetta sæst ikki minst á havnalagnum og teirri bygging, ið har hevur verið.*

### Kommunal bibstøð

Fuglafjarða kommuna er lutvíst við í byggiætlanini hjá Bergfrost, og fer kommunan at hava eina sonevnda bib-støð í høllini. Sigurd Simonsen, býráðsformaður í Fuglafirði, sigur, at meðan hinar bib-støðirnar í landinum honum kunnugt verða riknar av virkjunum, sum hava frystigoymslur á staðnum, metir Fuglafjarða kommuna tað vera betur, um ein slík støð verður óheft.

- Hetta er ein marknaðareftirlitisstøð, sum ES krevur, har eftirlit er við vørum, sum koma úr triðjalondum til Føroya og síðan verða seldar aftur til ES-lond.

Hann vísir á, at talan ikki bert er um at hava eftirlit við fiski, men eisini mjøli og øðrum úrdráttum, sum koma hendanvegin og verða seldar aftur til ES.

- Tað er Heilsufrøðiliga Starvsstovan, sum ger stakroyndir og kanningar av hesum vørum, og til hetta arbeiði hevur stovnurin brúk fyri einum høli til sítt arbeiði.

### 100 fermetrar

Sigurd Simonsen sigur, at Fuglafjarða kommuna fer at ráða yvir umleið 100 fermetrum í nýggja bygninginum hjá Bergfrosti.

- Nakað verður av útgerð í hølunum, men í aðrar mátar kemur Heilsufrøðiliga Starvsstovan sjálv við síni útgerð, tá ið kanningar verða gjørdar.

Hann vísir á, at ávísar vørur, sum Havsbrún keypir úr eitt nú Chili, soleiðis verða »bibbaðar« í Hetlandi, áðrenn tær koma til Føroya.

- Eg meti, at tað hevur týdning, at kommunan sum óheft rekur hesa eftirlitsstøðina, tí tá hava allir somu rættindi og somu møguleikar – eisini, hvat viðvíkur kostnaðinum at fáa vørurnar góðkendar, sigur Sigurd Simonsen.

# Inntøkurnar minkaðar við einum fjórðingi

**- Higartil í ár eru inntøkurnar hjá teimum, sum sigla við partrolarunum, í miðal lækkaðar við einum fjórðingi. Hjá teimum, sum eru við lemmatrolarum og línuskipum, er minkingin eini 10-15%, sigur Jákup Sólstein, formaður í Føroya Reiðarafelag**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Hóast fiskiskapurin hjá línubátum, partrolarum og lemmatrolarum sum heild hevur verið góður í ár, eru hýrurnar hjá teimum, sum sigla við hesum skipum, lækkaðar munandi.

Formaðurin í Føroya Reiðarafelag, Jákup Sólstein, hevur hugt at tølunum, men hevur enn ikki kannað tey so ógvuliga gjølla.

- Tó kann eg siga, at hýrurnar hjá teimum, sum sigla við partrolarunum, eru tær, sum hava verið fyri størstu afturgongdini.



*- Kemur ikki vend í við upsaprísunum, vænti eg, at tað fer at tátta í hjá partrolarunum og lemmatrolarunum, sigur Jákup Sólstein*

Hann sigur, at miðallækkingin er eini 26%. Hjá summum er lækkingin størri og minni hjá øðrum.

- Sambært tølunum, eg havi hugt at, er líkt til, at munandi afturgongd eisini hevur verið hjá teimum, sum sigla við línubátunum og lemmatrolarunum.

Hann heldur, at miðallækkingin her liggur um eini 10-15%, og kanska eru teir við lemmatrolarunum heldur verri fyri enn teir, sum sigla við línuskipunum.

### Upsin koksar

Orsøkin til, at manningarnar umborð á partrolarunum eru ringast fyri, er, at upsaprísurin fullkomiliga er koksaður – og hesir bátarnir veiða í nógv størstan mun upsa.

- Í løtuni liggur upsaprísurin á umleið 3 krónum fyri kilo, og onkuntíð er hann enntá lægri. Ein slíkur prísur ber ongum uppi í longdini, hvørki skipi ella manning.

Jákup Sólstein vísir á, at vit hava fingið nýggjar trolarar, og aðrir eru á veg.

- So, hetta verður ein keðilig støða, um upsaprísurin ikki fer at kvinka uppeftir aftur nakað skjótt. Í løtuni dugi eg tó ikki at síggja, at her verður nøkur knapplig vend tann rætta vegin.

Hann sigur, at inntøkurnar hjá teimum, sum fiska pelagiskan fisk, eisini hava verið fallandi í ár, men hann veit ikki at siga, hvussu stór henda lækking hevur verið.

- Svartkjaftaveiðan hevur verið góð, men bæði prísirnir á ídnaðarfiski, sild og makreli eru lækkaðir, og hetta sæst aftur í inntøkunum, sigur Jákup.

### Selja beinleiðis

Reglan um, at í minsta lagi triðingurin av veiðini hjá skipunum skal um uppboðssølu, er broytt fyri eini tíð síðan. Kunngerðin, sum álegði, at so skuldi verða, er avtikin. Tí kunnu skipini nú selja alla sína veiði beinleiðis til virkini – uttan um uppboðssøluna.

Í Sosialinum í gjár, segði Oskar Joensen á Fiskamarknaði Føroya, at nógvir trolarar selja upsan beinleiðis til virkini.

- Vit landa tískil næstan ongan upsa í løtuni, legði hann aftrat.

Jákup Sólstein vísir á, at reglan um, at fiskur, sum fer feskur og óvirkaður av landinum, skal um uppboðssølu, tó framvegis er galdandi. Somuleiðis er galdandi, at skip ikki skulu landa meira enn 25% av veiðini beinleiðis í útlandinum.

- Vit hava einki ímóti, at tvingaða uppboðssølan er broytt, soleiðis at marknaðarkreftirnar í enn størri mun sleppa at ráða, sigur formaðurin í Føroya Reiðarafelag.

### Fer at tátta í

Jákup Sólstein væntar, at kemur ikki vend í við upsaprísunum, sum smá útlit eru til í løtuni, fer tað at tátta í hjá partrolarunum og lemmatrolarunum.

- Men gongdin er misjøvn. Tølini, eg havi nevnt, eru miðaltøl.

Hann visir á, at eitt er, at upsaprísurin hevur verið so serstakliga lágur, men prísirnir á hýsu hava eisini verið ógvuliga vánaligir.

- Eg vænti tó, at hýsuprísirnir fara at kvinka uppeftir aftur, tá ið líður út á heystið.

Spurdur, um Føroya Reiðarafelag hevur varnast, at menn eru farnir í land av skipum, tí inntøkan er fallin, sigur Jákup Sólstein at enda.

- Vit hava ikki hoyrt nógv um hetta, men nakað er um, at menn eru farnir av skipum av hesi orsøk, sigur hann.


†

Elskaði sonur og beiggi okkara

**Karl Martin Smidt Jensen**
Oyri,
sonur Dorit og Kjartan

andaðist 31. august 20 ára gamal.
Komið verður í Norðskála kirkju fríggjadagin 5. september kl. 19.00
Jarðarferðin verður úr Norðskála kirkju leygardagin 6. september kl. 14.00.

**mamma, babba, Hans Erik og Pól Jóhannus**

Í staðin fyri blómur ella krans kann ein peningagáva latast til Talvfelagið Rók ella Flogbóltsfelagið Nøvuna konto í peningastovnunum.




## NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Komu og fóru samstundis

**Mánadagin 1. september var samkoma hjá Postverk Føroya á Óðinshædd í Havn, tá Mortan Rasmussen og Marita Jacobsen, sum høvdu arbeitt 46 ár á stovninum fóru frá við eftirtløn. Bæði byrjaðu 1. september 1957 og góvust 1. september 2003**

**Mortan Rasmussen**

Mánadagin 1. september hevði Mortan Rasmussen í Havn sín seinasta starvsdag á Postverkinum.

Mortan, ið er 62 ára gamal, er føddur á Kirkju á Fugloy, sonur Palmu, f. Soldal, ættað úr Sumba, og Rasmus Rasmussen, vanliga nevndur Rasmus í Fugloy.

Sum seks ára gamal fór Mortan til Klaksvíkar at ganga í skúla. Tá hann var liðugur við barna- og realskúlan, fór hann til Danmarkar, har hann 1. september 1957 fór í læru sum postassistentur hjá Post- & Telegrafvæsenet. Lærutíðin var trý ár, og í 1960 varð hann innkallaður til hertænastu í 16 mánaðir. Meginpartin av tíðini í danska herinum hevði hann við postin at gera til donsku hermenninar í Gaza og táverandi Belgisk Congo.

Liðugur við hertænastuna arbeiddi Mortan sum postassistentur í Danmark, til hann í 1963 kom heim aftur til Føroya og fekk starv sum postassistentur á posthúsinum í Havn. Í 1968 bleiv hann yvirassistentur og postkonrollørur í 1972.

Tá postverkið bleiv yvirtikið, 1 apríl 1976, bleiv Mortan ein av deildarleiðarunum. Hann var eisini við til at stovnað Føroya Postfelag. Í 1992 bleiv hann leiðari á marknaðardeildini á postverkinum og í 1998, tá postverkið fekk nýggjan stjóra, fekk hann nýggjar uppgávur so sum bræva- og pakkapostin í Føroyum, herundir eisini postútberingina.

Mortan giftist við Kirstin, f. Nolsøe, úr Klaksvík, dóttir Lindu, f. Skibenæs, av Skipanesi, og Georg Nolsøe, ættaður úr Vági.

Kirstin og Mortan eiga fimm børn, tey eru: Palma, sum býr í Íslandi, Georg sum býr í Havn, Rannvá sum býr í Danmark, og tvíburarnar Lindu og Rasmus sum búgva í Havn.



*Mortan Rasmussen og Marita Jacobsen. Tey komu úr hvør sínara ætt, Mortan kom úr eystri, úr Fugloy, og Marita kom úr vestri, úr Mykinesi. Bæði siga at postverkið hevur verið eitt gott og spennandi arbeiðspláss og tey hava trivist væl*

**Marita Jacobsen**

Mánadagin 1. september hevði Marita Jacobsen í Havn sín seinasta starvsdag á Postverkinum.

Marita er úr Mykinesi, hon er fødd í 1939, dóttir Maju, f. Joensen, og Eli Jacobsen, bæði úr Mykinesi.

Bæði abbin og pápin høvdu postin í Mykinesi.

Hon kom sum 15 ára gomul til Havnar at ganga í preliminerskúla og byrjaði sum skrivstovunæmingur á posthúsinum í Havn 1. september 1957. Tá hon byrjaði vóru tilsamans 25 starvsfólk á posthúsinum, harav seks vóru postboð í býnum og tvey landpostboð.

Umframt sína skrivstovuútbúgving hevur Marita tikið ymisk skeið hjá Post Danmark og merkonomútbúgving á Føroya Handilsskúla.

Síðan 1991 hevur hon verið skrivstovuleiðari á posthúsunum í høvuðsstaðarøkinum.

Marita er gift við Trygva Jacobsen, lærara, úr Vági, sonur Jesar K. Jacobsen, úr Mykinesi og Dionu f. Johannesen, úr Kollafirði.

Marita og Trygvi eiga tvey børn, tey eru: Eyðun, sum býr í Írlandi og Marjun, sum býr í Danmark.

## 30 ára starvsdagur á Føroya Gjaldstovu



1. august 2003 hevði Anna Højgaard starvast á Føroya Gjaldstova í 30 ár.

Hetta varð hátíðarhildið við einum morgun-matarhugna í gjár.

Anna er dóttir Óluvu og Tórur Hansen í Leynum.

Hon byrjaði á gjaldstovuni sum lærlingur. Tá ið Anna byrjaði, var roknskaparhaldið hjá landinum ikki so automatiserað sum í dag. Anna fekk fatur um ta tíðina, tá ið arbeitt varð við kolonnubókum til dagin í dag. Síðan Anna byrjaði á gjaldstovuni, hevur stovnurin verið gjøgnum eina stóra umlegging.

Hin 1. mars 1988, var hon sett sum bókhaldari á gjaldstovuni.

## Jórun (Vágsheyg) Jacobsen 60

Í dag, hósdagin 4. juli, fyllir Jórun Jacobsen í Klaksvík 60 ár. Hon er dóttir Kristiannu Poulsen av Eiði, sum doyði í 1991, og Joen Paula Vágsheyg, Peila hjá Jógvan Segl, sum doyði í 1970.

Kristianna og Peili áttu tríggjar døtur og ein son. Hallgerð er gift við Haldgrími Gregersen í Gøtu og býr har. Ása er gift við Hjørleif Ellingsgaard og býr í Klaksvík. Jógvan er giftur við Beintu Ziska, tey búgva í Klaksvík. Og Jórun er gift við Jóan Jakku Jacobsen, og eisini tey búgva í Klaksvík.

Jórun tók realprógv í Klaksvík í 1960. Hon giftist við Jóan Jakku í 1964, og tey fingu fýra børn: Annika er fødd í 1966 og er sjúkrasystir. Jacob Pauli er føddur í 1968 og er elektrikari. Erla varð fødd í 1971, men longu 16 ára gomul doyði hon í einari bilvanlukku, tá hon og drongurin, Heri Mørkøre, fóru á sjógv við bilinum innast við Stórukei í Klaksvík. Torkil er fjórða barnið og er føddur í 1977.

Jóan Jakku tók skiparaprógv í 1961. Hann var til skips og hevði skip sjálvur í eina tíð, til hann í 1977 legðist uppi. Hann arbeiddi í Klaksvíkar Havn í nøkur ár og frá 1990 var hann kranamaður á Kósini.

Tá Jórun hevði endað skúlagongdina, fór hon at arbeiða á Klaksvíkar Sjúkrahúsi og var so á húsarhaldsskúla í Haslev. Eftir tað arbeiddi hon á skrivstovuni hjá Joensen & Olsen (Seglhúsmonnunum) til 1964. Síðani hevur hon arbeitt úti av og á, m.a. á grannskoðaravirki.

## Mótashow á Gallarí Jinx

**Tíðindaskriv**

Fríggjakvøldið 5 sep. kl. 21:00 verður mótashow á Gallarínum.

Tað er føroyski sniðgevin Anja Collin, sum er eigari og sniðgevi av merkinum Baltzer Collin, sum sýnir fram sína summar 2004 kollektión.

Atgongumerkir verða seld á Gallarí Jinx - avmarkað nøgd.

Av tí at mótashow verður, lata vit aftur kl. 20:00 fríggjakvøldið og køkurin stongir kl.19:00

Men opið verður aftur sum vanligt leygarmorgunin kl.9:00.

## Arnhold Hjelm Nielsen varastjóri

**Tíðindaskriv**

Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum hevur í dag sett Arnold Hjelm Nielsen í starv sum varastjóri á Toll- og Skattstovu Føroya, Stýrinum.

Arnold Hjelm Nielsen er 39 ára gamal og hevur útbúgving sum verk-frøðingur. Seinastu tíðina hevur hann verið í leiðandi starvi hjá Ericson í Noregi.

## Dagurin

**4. september. Teodosia.** Navnið er helst komið upp í álmanakkan í staðin fyri mansnavnið Teodorius, tí at hann hevði longu 2. apríl sum halgidag.